# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## 25 ár síðan Ilse Clausen kom og fór við neytunum



*Jákup Højgaard Simonsen, stjóri á Eggvirkinum í Rituvík, og skipið, Ilse Clausen*

**Í november 1978 leigaði Eggvirkið í Rituvík djóraflutningsskipið Ilse Clausen, hjá danska reiðarínum C. Clausen til at flyta neyt av norsku rasuni úr Danmark til Føroya.**

Tá skipið var komið til Føroya í øllum góðum við hesum sjáldsama farmiumleið 150 neytum og kálvum – vísti tað seg, at loyvið at fáa tey í land ikki varð givið. Eftir at hava liðið á Kollafirði í umleið 14 dagar, uttan at nøkur semja fekst í lag millum landsstýrið og Jákup Højgaard Simonsen, sum hevði keypt neytini frá Bent Christensen, bónda, uttanfyri Næstved, mátti skipið avstað aftur til Danmarkar við neytunum, har tey vóru flutt til ein leigaðan bóndagarð uttanfyri Lemvig í Jútlandi.

*Kelda: Myndaárbókin, árið ið fór 1979*

## 25 ár síðan fyrstu føroysku sjónvarpssendingarnar



*Fyrsta sjónvarpsútgerðin. Torbein Rein í sendihølinum hjá Sjónvarpsfelagnum*

**Fyrsta sendiloyvi til føroyskar sjónvarpssendingar varð givið Sjónvarpsfelagnum í Havn í november 1978**

Ein meiriluti í landsstýrinum samtykti at geva Sjónvarpsfelagnum heimild til at gera royndarsendingar, til alment sjónvarp kom.

Seinni góðkendi Post & Telegrafvæsenet sendiloyvið og í apríl 1979 byrjaðu regluligar sjónvarpssendingar.

*Kelda: Myndaárbókin árið ið fór 1979*



*Ein av fyrstu sjónvarpsupptøkunum sum Tórbein Rein tók upp fyri Sjónvarpsfelagið. Elin K. Mouritsen og Óli Kurt Hansen við væl umtóktu barnasendingunum »Elin og Óli«*

## Peter Turtschaninoff deyður



*Peter Turtschaninoff - ein ljósbirtari í føroyskum tónleikalívi er slóknaður*

Fyrrverandi stjórin í Norðurlandahúsinum, Peter Turtschaninoff, er deyður í Barcelona, 52 ára gamal.

Peter, sum var úr Finnlandi, varð árini 1994-1999 fimti stjórin í Norðurlandahúsinum í Føroyum. Hann var útbúgvin journalistur og starvaðist á svensktmæltu støðini Vega hjá YLE í Finnlandi, har hann var redaktørur við ábyrgd fyri samfelagsspurningum.

Peter var í útbúgvingarørindum í sambandi við finska útvarpsstarvið, tá hann doyði í Spaniu, 18. november. Hann var føddur hin 29. juni 1951.

Hóast farin, liva minnini um Peter enn millum okkara. Tað var Peter, ið skapti afturvendandi tiltakið Prix Føroyar, hann bílegði fyrstu føroysku symfoniina, sum seinni fekk hægstu virðisløn á okkara leiðum og harafturat skapti hann karmarnar kring sangleikin Skeyk.

## Dagurin

**21. november. Mariu offurgerð.** Dagurin hildin til minnis um, at foreldrini leiddu hana niðan í halgidómin. 3 ára gomul gekk Maria einsamøll niðan tær 15 trappurnar inn í hitt alraheilagsta, har rætta tilhald hennara átti at vera.

## Rætting

Í gjár skrivaðu vit at framsýningin hjá Jákup Andreas Arge, myndamanni í Snarskivuni,lat upp hósdagin 23. november. Tað var ikki rætt. Framsýningin lat upp hósdagin 13. november og er sostatt opin. Vit biðja orsaka mistakið.

**mg**

# JÓLASÍÐAN



































